# TØKNINGUR TIL MAGN

## Vit sóknast eftir tøkningi til teknisku deild hjá Magn

### Um Magn
Magn tryggjar orku til Føroyar og føroyingar. Vit eru 130 starvsfólk, svarandi til 80 ársverk. Høvuðsskrivstova okkara er í Havn og deildarskrivstovur eru í Klaksvík og á Tvøroyri. 10 service støðir bera Magn navnið, av hesum eigur Magn tær 4. Vit hava goymslur í Klaksvík og í Havn, og mált uppá sølu eru vit ein av Føroya størstu fyritøkum.

### Um starvið
Starvið krevur innlit í el-stýringar, luftstýringar, hydraulikstýringar og mekanik, so sum pumpur o.a. Tekniska deild tekur sær av viðlíkahaldi av bensinstøðum, oljugoymslum, bátaannleggum og tangauppbygnaði á okkara tangabilum.

### Uppgávur í stuttum:
- Viðlíkahald av bilvaskimaskinum, pumpustandarum, kortautomatum, kassaskipanum o.a. á bensinstøðum.
- Viðlíkahald av okkara 14 bátaannleggum kring landið.
- Viðlíkahald av tangauppbygnaði á okkara 14 tangabilum.
- Viðlíkahald av tangum, pumpuútbúnaði og áfyllingarrampu á okkara 3 oljugoymslum,
- Annað fyrifallandi viðlíkahald á okkara ognir.

### Vit bjóða:
Eitt gott, avbjóðandi og ábyrgdarfult starv í eini fyritøku í menning. Her er vítt til veggja, og um tú vilt og dugir, so sleppur tú eisini. Tað er avgerðandi, at tú ert før/ur fyri at arbeiða sjálvstøðugt og at tú loysir tínar uppgávur væl. Av hesi orsøk fært tú góðan stuðul og alla neyðuga upplæring og útbúgving.

### Vit vænta:
- Viðkomandi handverkaraútbúgving, so sum elektrikari, bilmekanikari ella líknandi.
- At tú dugur væl at loysa bæði el- og mekaniskar uppgávur.
- At tú ert tænastusinnað/ur og góð evni at samskifta og samstarva
- At tú hevur áræði og dugur at arbeiða sjálvstøðug. At tú eisini hevur møguleika og vilja at arbeiða uttan fyri vanliga arbeiðstíð

### Okkara virði eru:
- Kundin í fokus
- Vitan og førleiki leingi livið
- Skjótt er gott
- Gleiði gevur megi.

Um tú umhugsar at søkja starvið, vinarliga fær inn á www.magn.fo og hygg nærri eftir, hvussu vit á Magn arbeiða við virðum felagsins í okkara dagliga arbeiði.

Hevur tú spurningar, vinarliga vend tær til Martin Heinesen á telefon 347460, 237460 ella á martin@magn.fo

Umsóknir við prógvum skulu latast inn innan 13. september. Antin við at senda bræv til:

**Magn**
**Vestara Bryggja 10**
**FO-110 Tórshavn**
**Att.:Martin Heinesen**

Ella við at senda teldupost til martin@magn.fo

www.magn.fo

magn TÍN ORKA




Umbiðið kalendaran nú og sendið hann til útheimin

Tel. 341800
Johanna Vang
johanna@sosialurin.fo